Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS

# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
# 29. APRÍL 2011

# ÁRSFRÁGREIÐING 2010

## Frágreiðing frá nevndini

Føroyska framleiðslan av laksi og sílum var í 2010 knappliga 48.000 tons í rundari vekt, harav góð 2.000 tons av sílum. Hetta er áleið 12.000 tons færri enn seinasta ár. Men orsakað av góðum prísum var søluvirðið fyri 2010 kortini størri enn søluvirðið fyri 2009, ávikavist 1,48 mia. kr. og 1,38 mia. kr.

Karmarnir um alivinnuna eru yvirhøvur góðir, og vinnan hevur seinasta árið víst góð úrslit, tá tað kemur til vøkstur og felli, og eingir sjúkutilburðir hava verið. Saman við sera góðum marknaðarprísum hevur hetta gjørt, at alivinnan hevði góð fíggjarlig úrslit í 2010.

Trupulleikar hava verið við lús og átøk eru tí gjørd. Støðan er góð sum er, og alivinnan fylgir gongdini tætt.

Roknað verður við, at útboðið av laksi á marknaðinum í Evropa og í heiminum sum heild, framhaldandi verður minni enn eftirspurningurin, orsaka av sjúkustøðuni í Kili. Marknaðarprísurin á alifiski er í løtuni góður, og er tað tí sera týdningarmikið, at alivinnan fær konsolidera seg, soleiðis at nakað er at standa ímóti við til komandi tíðir. Alisøgan sigur frá, at laksaprísurin sveiggjar sera nógv, og tað hava verið longri tíðarskeið har ikki ber til at forvinna pening orsaka av, at marknaðarprísirnir hava verið langt undir framleiðsluprísinum.

Í 2010 vórðu áleið 14,5 mió. smolt sett út, og mett verður at talan verður um somu nøgd í 2011. Alivinnan væntar ikki, at føroyska framleiðslan av alifiski kann vaksa munandi við verandi tøkini, men betri gagnnýtsla av verandi aliøkjum kann økja framleiðsluna nakað afturat.

Týdningarmestu málini, sum nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur arbeitt við í undanfarna ári eru m.a. ætlanirnar hjá politiska myndugleikanum at áleggja alivinnuni ein sonevndan loyvisskatt/loyvisgjald, tænastugjøldini, sum almennir myndugleikar antin hækka ella áseta fleiri av. Harumframt hevur felagið framhaldandi arbeitt við málinum um avleiðingar av stongslinum av russiska marknaðinum fyri føroyskar fiskavørur, verkætlanini hjá felagnum at marknaðarføra føroyskan alifisk, árliga Aliráðstevnan og nýggja alisøgan “Ringar á sjónum”, sum kom út á degnum fyri Aliráðstevnuna tann 25. februar.

Viðvíkjandi sonevnda loyvisskattinum, so er hesin settur í gildi fyri 2011, men tað er framvegis ógreitt, hvat verður galdandi eftir árslok. Eftir at arbeiðsbólkur um málið varð upploystur, hevur felagið biðið um at fáa greið boð frá politisku skipanini, men einki svar er komið. Havbúnaðarfelagið metir, at handfaringin av málinum er átaluverd. Eisini finst felagið framhaldandi á, at mismunur verður gjørdur á fiskivinnuni og alivinnuni í mun til gjøld og treytir annars at virka undir.

Viðvíkjandi gjøldum á alivinnuna hevur Havbúnaðarfelagið áhaldandi ført fram, at alivinnan kann góðtaka at gjalda fyri eftirlit frá tí almenna, men krevur, at gjøgnumskygni er í mátanum gjøldini verða áløgd. Felagið hevur eisini nýligani fingið staðfest av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, at gjøldini eru ov høgt ásett í mun til kostnaðin av at veita tænasturnar. Eisini hevur felagið fingið eina politiska tilsøgn um, at hesi gjøld skulu lækka, so nú bíðar felagið eftir hesum.

Soleiðis sum gongdin hevur verið viðvíkjandi alsamt fleiri gjøldum og hækking av gjøldum metir Havbúnaðarfelagið, at vandi er fyri, at kappingarevnini hjá føroysku alivinnuni. Orsaka av landafrøðiligari staðseting hava føroyskar fyritøkur m.a. størri útreiðslur av flutningi til marknaðin enn kappingarneytarnir, og førdi politikkurin, har vinnan fær álagt gjøld av øllum handa slagi, økir um munin á fortreytunum hjá føroysku alivinnuni í mun til kappingarneytarnar.

Viðvíkjandi stongslinum frá russiska marknaðinum, hevur Havbúnaðarfelagið arbeitt við at fáa liðiligari mannagongdir í sambandi við útflutningin. Avtalan, sum varð gjørd millum føroyskar og russiskar myndugleikar, tá marknaðarliðini opnaðu aftur, vísti seg at verða lítið arbeiðslig fyri alivinnuna. Ein loysn hevur leingi verið ávegis, men er eisini umstendilig og kostar nakað eyka. Felagið eftirlýsir ein virknari leiklut frá politiska myndugleikanum, tá tað snýr seg um at tryggja føroyskari vinnu marknaðaratgongd.

# Innihaldsyvirlit

1. ENDAMÁL HAVBÚNAÐARFELAGSINS ..... 4
2. ALMENT UM GONGDINA INNAN ALIVINNUNA ..... 5
2.1 FRAMLEIÐSLA ..... 6
2.2 ÚTSETING AV SMOLTI ..... 7
2.3 ÚTFLUTNINGUR ..... 8
2.4 PRÍSIR ..... 10
2.5 BÝTIÐ AV ÚTFLUTNINGI ..... 11
2.6 BÝTIÐ SEINASTU FÝRA ÁRINI ..... 12
3. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM ..... 14
3.1 GJØLD FYRI TÆNASTUR OG EFTIRLIT ..... 14
3.2 LOYVISSKATTUR ..... 14
3.3 ALIRÁÐSTEVNAN 2011 ..... 16
3.4 ALISØGAN "RINGAR Á SJÓNUM" ..... 16
3.5 BÝTIÐ AV KOMMUNUSKATTI ..... 16
3.6 FØROYSKUR FISKUR ÚTIHÝSTUR AV RUSSISKA MARKNAÐINUM ..... 16
3.7 GRANSKING AV TÝDNINGI FYRI ALIVINNUNA ..... 17
3.8 LÚSASTØÐAN ..... 17
3.9 SALMON FROM THE FAROE ISLANDS ..... 18
4. LÓGIR OG KUNNGERÐIR ..... 19
4.1 MATVØRULÓG OG KUNNGERÐ UM LØGGILDING ..... 19
4.2 RAKSTRARKUNNGERÐIN ..... 19
4.3 KUNNGERÐ UM YVIRVØKU OG TÁLMING AV LÚS ..... 19
4.4 BUNKRINGSKUNNGERÐIN ..... 20
4.5 KUNNGERÐ UM TAÐING ..... 20

# 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá alivinnuni, bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:

Nevndarlimir:
Bogi Jacobsen, formaður, Viking Seafood
Ragnar Joensen, næstformaður, Marine Harvest
Atli Gregersen, Luna
Erhard Joensen, Faroe Farming
Regin Jacobsen, Bakkafrost

Eykalimur:
Odd Eliasen, Havsbrún

## 2. Alment um gongdina innan alivinnuna

Alivinnan er væl fyri og úrslitini seinastu árini hava verið góð. Síðani ársskifti 2009/2010 hava tað verið 5 feløg í alivinnuni. Karmarnir um alivinnuna eru góðir, og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Bygt á góðar karmar og nærlagni, er alivinnan í dag burðardygg. Hetta sæst aftur, tí fiskurin veksur væl og hevur sera lágt fellið, samanborið við størstu kappingarneytarnar í Noregi og Kili.

Meðan framleiðslan í 2006 og 2007 var eyðkend við, at sera lítið var av fiski, var framleidda nøgdin av laksi og sílum í 2008 og 2009 vaksin til ávikavist 47.000 tons og knøpp 60.000 tons í rundari vekt. Framleiðslan av laksi og sílum í 2010 minkaði nakað í mun til nøgdina í 2009 og var aftur nærri framleiðslunøgdini í 2008, tvs. áleið 12.000 tons lægri. Orsakað av góðum marknaðarprísum var søluvirðið fyri 2010 kortini størri enn søluvirðið fyri 2009. Søluvirðið varð 1,48 mia. kr. og 1,38 mia. kr. í ávikavist 2010 og 2009.

Samanumtikið hevur 2010 eins og 2009 verið eitt gott ár og sigast kann, at alivinnan er komin upp á eina burðardygga og støðuga framleiðslunøgd. Í 2011 verður mett, at tøkan verður áleið tann sama sum í 2009, tvs. áleið 60.000 tons í rundari vekt. Samstundis sum ongar ábendingar enn eru um, at prísurin fer at verða lægri. Um hesi útlit halda, so merkir tað, at útflutningsvirðið fyri 2011 verður hægri enn í 2010 ella í minsta lagi á sama støði.

Prísurin fyri laks hevur verið javnt høgur í 2009 og 2010 orsakað av vaksandi eftirspurninginum á heimsmarknaðinum, sum aftur er orsakað av støðuni í alivinnuni í Chile. Hvørji útlitini eru í longdini er torført at meta um, tí búskaparkreppan, sum er um allan heim, hevur ikki slept takinum enn. Ábendingar eru um, at tað gongur heldur frægari í USA og Evropa, men tað er enn ov tíðliga at gera endaliga niðurstøðu um hetta.

Laksaprísurin hevur hildið sær munandi betri seinasta hálvtannað árið enn marknaðarprísurin á øðrum fiskasløgum. Orsøkin er helst, at framleiðslan av alifiski í Chili er minkað munandi orsaka av sjúkutrupulleikum. Kili kemur helst fyri seg aftur í 2012/2013, og tá verður roknað við, at prísurin á alifiski ferð at stabilisera seg á eitt meira vanligt støðið. Alisøgan sigur frá, at prísurin kann sveiggja sera nógv, men roknað

verður við, at um alarar hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan megna at liva við teimum príssveiggjum, sum fara at koma.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett, at alivinnan hevur karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir alsamt arbeiða við at gera hesar karmar enn betri.

Seinasta tvey árini hevur ein ávísur trupulleiki verið við lús, sum byrjaði í Sundalagnum. Alivinnan hevur saman við Fiskaaling og myndugleikunum arbeitt miðvíst við hesi avbjóðing, og mett verður at støðan í løtuni er rættuliga góð. Sundalagið varð tømt fyri fisk seinasta vár og eftirfylgjandi var alt økið eisini braklagt. Síðani er fiskur settur útaftur og framyvir er ætlanin at reka Kaldbaksfjørð og Sundalagið sum eitt aliøki.

## 2.1 Framleiðsla

Framleiðslan í alivinnuni vaks nógv frá 1999 til 2003 fyri síðani at minka fram til 2007. Í 2008 og 2009 er tøkan komin uppaftur á 2003 støði. Meðan nøgdin minkaði nakað í 2010, so verður mett, at tøkan fyri 2011 verður á sama støði sum í 2009. Tøkan í 2010 var 47.792 tons í livandi vekt.

Mynd 1. Tøka av alifiski fram til 2010 (livandi vekt)




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 0,915 | 1,440 | 1,260 | 3,292 | 1,315 | 3,126 | 11,14 | 10,22 | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 |
| Laks | 17,66 | 20,31 | 19,18 | 39,25 | 33,51 | 46,01 | 44,95 | 52,53 | 40,99 | 18,96 | 13,08 | 22,31 | 38,85 | 51,50 | 45,41 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Í 2010 vórðu síl ikki sett út aftur og tískil verður ikki tøka av sílum komandi árini.

Verður hugt eftir nøgdini av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku, sæst hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið.

Mynd 2 Tøka av alifiski viku fyri viku í 2010




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## 2.2 Útseting av smolti

Mynd 3 vísir útsetingina av laksi og sílum frá 2006 til 2010 og framskriving fyri 2011. Myndin vísir, at útsetingin av fiski, seinastu árini er vaksin frá umleið 9 mió. stk. til knøpp 11 mió. smolt í 2009. Í 2010 vórðu umleið 14,5 mió. smolt sett út. Í 2007 vóru omanfyri tvær mió. síl sett út, í 2008 varð talið áleið 1,5 mió., í 2009 vóru minni enn 1 mió. síl sett út, og í 2010 vóru eingi síl sett út.

Mynd 3. Útseting av smolti frá 1995 til 2010




| | ´95 | ´96 | ´97 | ´98 | ´99 | ´00 | ´01 | ´02 | ´03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| mill stk | 8,35 | 7,63 | 9,63 | 13,3 | 15,5 | 19,2 | 20,8 | 20,7 | 8,7 | 2,9 | 4,71 | 9,15 | 9,45 | 8,69 | 11,2 | 14,5 |

Sambært uppgerð fyri tal av fiski á smoltstøðunum 1. jan. 2011, so er talið á leið tað sama sum tað var 1. jan. 2010. Tað kundi bent á, at smoltútsetingin í 2011 verður áleið tað sama sum í 2010, tvs. 14,5 mill.

## 2.3 Útflutningur

Mynd 4. Útflutningur av alifiski í virði frá 2003 til 2010 (1000 kr.)




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 4 vísir, at útflutningsvirðið á alifiski var í 2003 knappa milliard. Frá 2004 til 2006 minkaði útflutningsvirðið niðurum hálvu milliardina, fyri síðani at taka seg uppaftur ár fyri ár fram til og við 2010. Í 2009 var útflutningsvirði knappa 1,4 milliard krónur, men hóast tøkan fyri 2010 varð væl lægri enn fyri 2009, so var útflutningsvirði hægri. Prísurin á alifiski í 2010, hevur verið serstakliga góður, og serliga er tað amerikanski marknaðurin, sum hevur gjørt munin, eftir at útflutningurin nærum steðgaði til Russlands, orsaka av stongslinum av føroyskum vørum frá russiska marknaðinum. Útlitini komandi tíðina verða mett at verða hampiliga góð, tó so, at óvissur eru. Framleiðslan hjá Kili er framvegis lág og ávirkar hetta marknaðin. USA eftirspyr stórum nøgdum av alifiski, og er eitt ávíst skifti farið fram millum marknaðin í Evropa og USA. Um støðan í Japan - eftir herviligu náttúruvanlukkurnar – fær nakra avleiðing fyri útflutningin av føroyskum alilaksi er framvegis óvist.

Føroyski útflutningurin av alifiski er bygdur á eina alivinnu, sum virkar innan fyri sera góðar karmar. Hesir karmar vóru lagdir, meðan alivinnan var í kreppu, og vóru við til at fáa áhugan hjá íleggjarum at gera íløgur aftur í alivinnuna. Alarar eru í dag nærlagdir

og hava ein skynsaman rakstur, har umhvørvisvernd og sjúkufyribyrging eru sett í hásæti. Útflutningurin er tí bygdur á eina burðardygga alivinnu, har vágin fyri sjúku og vánaligum rakstri er neyvt stýrdur.

Marknaðaratgongd er tó framvegis ein avbjóðing hjá alivinnuni. Tollforðanin, sum hevur verið á føroyskum sílum á ES marknaðinum, varð tikin aftur fyri hálvumøðrum ári síðani, men undan hesum avgjørdi alivinnan ikki at fáast við sílaframleiðslu. Komandi árini verða síl ikki ald í Føroyum og ilt er at meta um nær ella um sílaframleiðsla fer at taka seg uppaftur í Føroyum.

Í 2008 varð alivinnan stongd úti av russiska marknaðinum, men marknaðurin opnaði aftur í 2009. Tó so hevur tað víst seg, at útflutningurin av feskum alifiski til Russlands ikki hevur tikið seg uppaftur í tann mun hann var undan stongslinum. Hetta kemst av, at russar vilja, at bingjurnar við feskum fiski skulu blombast í Føroyum og ikki latast uppaftur fyrr enn í Russlandi. Uppskot til loysn er gjørt um at fáa loyvi frá russum at umlasta feska vøru í Danmark og at fáa danskar heilsufrøðiligar myndugleikar at blombera bingjurnar har. Hetta er tó framvegis ikki komið í gongd, og eisini skal leggjast afturat, at talan er um eina loysn, ið ger tað umstendiligari og sum viðførir nakað av eykakostnað fyri vinnuna, og tí er ikki talan um eina góða loysn fyri vinnuna.

Ein slíkur stongsil, sum føroyingar hava upplivað frá russiska marknaðinum hevur stóra ávirkan á vinnuna, og alt eigur at gerast fyri ikki at koma í slíka støðu aftur. Felagið eftirlýsir ein virknari leiklut frá føroyskum myndugleikum, tá tað snýr seg um at tryggja marknaðaratgongd fyri føroyska vinnu.

## 2.4 Prísir

Marknaðarprísurin hevur stóra ávirkan á avrikið hjá alivinnuni, tí hann sveiggjar sera nógv. Mynd 5 vísir ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1993 til 2010. Sum myndin vísir, eru umleið 6 ár millum prístindar og prísgjáir, undantak tó fyri 2009 og 2010, har prísurin er farin munandi uppeftir, sum fyrst og fremst skyldast, at útboðið av alifiski á heimsmarknaðinum er fallið sera nógv orsaka av kreppuni í Kili. Prístindar hava verið í 1994, 2000, 2006, og so nú í 2009 og 2010, meðan prísgjáir vóru í 1997 og 2003.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini er nógv tengt at, í hvønn mun og hvussu skjótt Chilenska framleiðslan av alifiski kemur uppaftur á sama støðið, sum framleiðslan var á fyri nøkrum árum síðani. Metingar vísa, at í 2012/2013 kann væntast, at Chilenska framleiðslan helst hevur stabiliserað seg aftur, og tá kann væntast, at trýst verður á marknaðarprísin fyri laks.

Mynd 5. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi. FOB Føroyar




Kelda: Hagstova Føroya

Prísurin á feskum kruvdum laksi var í 2000 í miðal góðar 28 kr./kg og fall síðani til góðar 16 kr./kg í 2003. Prísurin hevur síðani hækkað á hvørjum ári fram til 2006, tá hann var á nærum 30 kr./kg í miðal. Í 2008 lækkaði prísurin aftur til einar 24 kr./kg. Í 2009 hækkaði prísurin aftur til nærum 28 kr./kg, og í 2010 varð hann oman fyri heilar 37 kr./kg.

Mynd 6. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaportiónum.




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 6 vísir miðalprísin á frystum laksaportiónum frá 2003, tá framleiðslan veruliga tók dik á seg fram. Prísurin á laksaportiónum sveiggjar eisini, men er væl meira støðugur enn prísurin á feskum laksi. Prísurin hevur ligið rættiliga støðugur omanfyri 50 kr./kg, men er onkur tíðarskeið farin líka niður um. Í 2006 lá prísurin oman fyri 68 kr./kg, fyri síðani at lækka. Men eftir 2008 hækkaði prísurin aftur, og í 2010 nærkaðist miðalprísurin støðinum frá 2006 við nærum 67 kr./kg laksaportiónir.

## 2.5 Býtið av útflutningi

Mynd 7 vísir býtið av útflutninginum í virði. Feskur laksur hevur verið sera dominerandi partur av útflutninginum, men í 2006 kom broyting í, tá laksaportiónir vístu seg at økja um sín part av útflutninginum. Feski laksurin er tó framvegis dominerandi í útflutninginum. Í 2007 táttaði útflutningsvirðið frá alivinnuni í góðar 600 mió. kr. fyri síðani í 2008 at verða góðar 900 mió. kr. Í 2009 var útflutningsvirðið knappar 1,4 milliard krónur.

Mynd 7. Útflutningsbýtið av alifiski í virðið




Kelda: Hagstova Føroya

Útflutningsvirðið á laksaportiónum, hevur víst seg at vera sera javnt øll árini og roknað verður við, at útflutningsvirðið fyri laksaportiónir fer at vaksa nakað afturat komandi ár, tí framleiðsluorkan er vaksin.

## 2.6 Býtið seinastu fýra árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit fyri útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Fráskurður o.a. er ikki við. Tølini eru fyri seinastu sjey árini.

Talva 1. Útflutningsvirði fyri ymsu vørurnar frá 2004 til 2010, í 1.000 kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 424.299 | 206.522 | 134.650 | 254.581 | 547.364 | 795.934 | 803.161 |
| Frystur laksur | 69.632 | 53.660 | 32.573 | 55.274 | 40.826 | 68.587 | 69.508 |
| Laksaportiónir | 184.324 | 169.967 | 195.024 | 171.806 | 213.274 | 303.505 | 423.931 |
| Laksur, annað | 6.731 | 9.703 | 12.074 | 11.000 | 22.956 | 34.703 | 41.456 |
| Fesk síl | 447 | 484 | 34.657 | 14.043 | 13.814 | 48.320 | 43.865 |
| Fryst síl | 76.547 | 58.190 | 64.034 | 86.730 | 124.731 | 123.149 | 24.851 |
| Síl, annað | 372 | 0 | 168 | 0 | 73 | 3.613 | 1.238 |
| **Útfl.v. tils.** | **762.351** | **498.526** | **473.178** | **593.434** | **963.038** | **1.377.809** | **1.408.010** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar í 1000 tonsum

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 23.312 | 9.330 | 4.514 | 10.347 | 22.681 | 28.489 | 21.541 |
| Frystur laksur | 3.509 | 2.374 | 1.073 | 2.087 | 1.598 | 2.587 | 1.778 |
| Laksaportiónir | 3.870 | 3.104 | 2.849 | 2.978 | 4.194 | 5.653 | 6.339 |
| Laksur, annað | 479 | 736 | 1.131 | 1.400 | 3.280 | 3.835 | 4.037 |
| Fesk síl | 21 | 19 | 1.302 | 637 | 644 | 2.059 | 1.273 |
| Fryst síl | 3.607 | 2.802 | 2.302 | 3.864 | 5.598 | 4.970 | 779 |
| **Tilsamans** | **34.797** | **18.364** | **13.172** | **21.313** | **37.996** | **47.591** | **35.747** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar pr. kg.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 18,20 | 22,13 | 29,83 | 24,60 | 24,13 | 27,94 | 37,29 |
| Frystur laksur | 19,84 | 22,61 | 30,36 | 26,49 | 25,55 | 26,52 | 39,09 |
| Laksaportiónir | 47,63 | 54,76 | 68,45 | 57,69 | 50,82 | 53,69 | 66,88 |
| Fesk síl | 21,29 | 25,47 | 26,62 | 22,06 | 21,45 | 23,47 | 34,45 |
| Fryst síl | 21,22 | 20,77 | 27,81 | 22,45 | 22,28 | 24,78 | 31,90 |

Kelda: Hagstova Føroya

Sum talvurnar vísa so eru bæði nøgdin og útflutningsvirðið av vørum frá alivinnuni voksin seinastu árini undantikið í 2010. Verður hugt eftir gongdini í miðalprísinum á ymisku vørunum sæst, at miðalprísurin á øllum vørum er fallin munandi í mun til 2006, sum var eitt sera gott ár. Í 2009 javnaði hesin munur tó nakað aftur, og í 2010 hevur miðalprísurin verið nógv tann hægsti í tíðarskeiðinum.

# 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

## 3.1 Gjøld fyri tænastur og eftirlit

Seinastu árini hevur rættuligur ágangur verið ímóti alivinnuni. Alivinnan er áløgd gjøld fyri allar tænastur, sum vinnan fær frá myndugleikunum og í 2009 eru hesi gjøld munandi økt. Hetta er bæði fyri vetrinera eftiransing, fyri yvirvøku av heilivágsleivdum umframt kostnaðin fyri umhvørviseftiransing.

Havbúnaðarfelagið hevur brúkt nógva orku uppá hesi mál í 2009 og 2010 og nevndin er samd um, at alivinnan kann átaka sær at gjalda fyri tænastur frá tí almenna, men tað má verða skil á, hvussu hesi gjøld eru ásett, soleiðis at vinnugreinin ikki fær størri kostnaðir álagdar enn veruligu útreiðslurnar eru av tænastunum. Havbúnaðarfelagið metir, at ávís gjøld verða kravd, sum eru rættuliga langt omanfyri veruliga kostnaðin av teimum tænastum, sum gjøldini skulu dekka. Enn hevur Havbúnaðarfelagið ikki sæð skjalprógv fyri, at gjøldini verða ásett út frá kostprísunum fyri tænasturnar, soleiðis sum er ásett í játtanarreglum landsstýrisins. Fundur hevur verið við avvarðandi aðalráð um spurningin, og har er gjørt greitt, at landsstýrisfólkini vilja hava, at gjøldini verða ásett soleiðis, at tey dekkað kostnaðin av tænastuni.

Í sambandi við fundarvirksemi í Vinnumálaráðnum í januar í 2010 var spurningurin um gjøld tikin upp við Vinnumálaráðið og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Á fundi varð staðfest av starvsstovuni sjálvari, at gjøldini eru ov høgt ásett í mun til kostnaðin at veita tænasturnar. Fráboðað varð tó, at um gjøldini skulu lækkast, so má grundarlagið fyri at taka gjøld víðkast til aðrar vinnur enn bara alivinnuna. Við hesum er staðfest, at alivinnan í veruleikanum eisini rindar fyri tænastur og eftirlit í mun til aðrar vinnugreinar.

Havbúnaðarfelagið hevur fingið tilsøgn frá landsstýrismanninum í vinnumálum um, at gjøldini skulu lækka, soleiðis at hesi samsvara við kostnaðin.

## 3.2 Loyvisskattur

Við árslok í 2010 samtykti Løgtingið eina broyting í skattalógini um, at inntøka frá fiski- og alivinnu verður áløgd ein tilfeingis/loyvisskatt á 2,5 % av skattskyldugari inntøku, hægri enn 1.000.000 kr. Hesin skattur fellur til landskassanum í 3 gjøldum í inntøkuárinum.

Henda skipan hevur tó bert virknað fyri inntøkuárið 2011, og tí skuldu, sambært lógaruppskotinum, arbeiðsbólkar setast fyri at gera uppskot um, hvussu skatta- og avgjaldsviðurskiftini hjá hesum vinnum skulu verða í framtíðini.

Fyri alivinnuna varð ein arbeiðsbólkur settur undir Vinnumálaráðnum í desember 2010. Arbeiðssetningurin legði upp til eina skipan við einum sonevndum loyvisgjaldi, skilt sum eitt fast gjald. Havbúnaðarfelagið gjørdi frá byrjan av vart við, at felagið ikki tekur undir við einum tílíkum gjaldi. Eitt fast gjald kann vera til stóran ampa fyri alivinnuna í tíðum við vánaligum úrslitum. Havbúnaðarfelagið avgjørdi tó at luttaka í arbeiðinum, men einki úrslit fyriliggur enn.

Orsakað av ógreiðu støðuni, avgjørdi nevndin at senda eitt skriv til politiska myndugleikan. Í skrivi tann 17. mars varð biðið um boð um politisku ætlanirnar, umframt at sjónarmiðini hjá felagnum vóru lýst. Felagið hevur trupult við at skilja politisku ætlanirnar at áleggja alivinnuni ein loyvisskatt/loyvisgjald, meðan stórsti parturin av fiskivinnuni ikki kemur at rinda nakað gjald yvirhøvur, hóast fiskivinnan beinleiðis fiskar tilfeingið hjá landinum upp úr sjónum. Eisini varð víst á, at meðan fiskivinnan er ein tilfeingisvinna, so er alivinnan ein framleiðsluvinna, ið rindar fyri sína egnu ráváru. Felagið ásannar tó, at fortreytin fyri alivinnuni sum framleiðsluvinnu er atgongdin til at nýta føroysku firðirnar.

Í skrivinum varð eisini víst á, at politiska skipanin harumframt enntá veitir fiskivinnuni stuðul úr landskassanum, ið er beinleiðis kappingaravlagandi fyri alivinnuna. Heldur ikki rindar fiskivinnan fyri tær tænastur, ið tað almenna veitir vinnuni, eins og alivinnan ger.

Felagið vísti tó á, at tað er altavgerandi fyri alivinnuna, at vinnan hevur tryggar og forútsigiligar karmar at virka undir. Og at um so er, at eitt gjald skal áleggjast, so má felagið takast við uppá ráð. Um alivinnan skal rinda ein loyviskatt ella eina ressursurentu orsakað av, at alivinnan hevur atgongd til eitt avmarkað tilfeingið, so má grundgevingin fyri hesum vera, at vinnan fær ein óvanligan meirvinning burturúr støðuni. Áseting av einum møguligum gjaldi má tískil taka støði í hesum.

Sjónarmiðið hjá felagnum er, at um eitt gjald skal áleggjast, so skal tað vera sum ein skattlig skipan tengd at úrslitinum, og ikki eitt fast gjald, sum kann vera til stóran ampa fyri alivinnuna í tíðum við vánaligum úrslitum. Eisini hevur felagið tað sjónarmið, at ein tílíkur skattur skal útroknast á sama hátt sum partafelagsskatturin, tvs. at kommunurnar skulu fáa sín part.

Felagið gjørdi eisini vart við, at um politiski myndugleikin ætlar at áleggja vinnuni eitt gjald grundað á, at vinnan fær játtað aliloyvi frá almennari síðu, so er tað ikki meiri enn rímiligt, at vinnan fær trygd fyri teimum loyvum, sum rindast skal fyri. Verandi lóg er ógreið viðvíkjandi áseting um leingjan av einum aliloyvi, og viðførir hetta ótryggar karmar fyri alivinnuna at virka undir.

### 3.3 Aliráðstevnan 2011

Fimta árið á rað hevur Havbúnaðarfelagið skipað fyri aliráðstevnu. Aliráðstevnan er vorðin ein fastur táttur í tí virksemi Havbúnaðarfelagið hevur valt at leggja dent á. Orsøkin er einføld. Nevndin í felagnum ynskir at førleikamenna starvsfólkið í vinnuni og hetta er aðalmálið við teimum fyrilestrum, sum verða fyriskipaðir á aliráðstevnuni.

Undirtøkan á Aliráðstevnuni varð met høg, og varð útselt til tiltakið um dagin og til tiltakið um kvøldið. Orsakað av umbyggingum á Hotel Føroyum, har ráðstevnan varð hildin, varð ikki møguligt at geva rúm fyri fleiri. Møguleiki var fyri 240 at luttaka um dagin og 226 til veitsluna um kvøldið. Av hesum vóru 2/3 starvsfólk í alivinnuni.

### 3.4 Alisøgan "Ringar á sjónum"

Alisøgan "Ringar á sjónum" kom út 25. februar 2011, sama dag sum Aliráðstevnan varð hildin, og stutt framløga av bókini var tí eisini á sjálvari ráðstevnuni. Tað er Helgi Jacobsen, sum hevur útvegað tilfar og skrivað søguna um føroysku alivinnuna fram til 2010. Bókin er skrivað eftir áheitan frá Havbúnaðarfelagnum, og er tað felagið sjálvt, ið hevur givið bókina út. Bókin kostar 298 kr.

### 3.5 Býtið av kommunuskatti

Nevndin hevur á fleiri fundum umrøtt spurningin um býtið av kommunuskatti. Málið hevur viðkomandi í og við, at skattalógin ikki er greið í mun til atvinnukommunuskatt. Men í og við at krøv til landalistøðir eru ásett sambært rakstrarkunngerðini metir felagið, at kravið um fast rakstrarstað sambært skattalógini er uppfylt.

### 3.6 Føroyskur fiskur útihýstur av russiska marknaðinum

Í september 2008 var føroyskur fiskur útihýstur av russiska marknaðinum. Hetta var sera óheppið fyri føroysku alivinnuna og Havbúnaðarfelagið hevur lagt stóra orku í at samstarva við myndugleikarnar um at fáa opna upp aftur fyri útflutninginum til Russland. Á sumri í 2009 opnaði marknaðurin aftur, eftir at Føroyar og Russland skrivaðu undir avtalu um, hvussu samstarvið skuldi skipast framyvir.

Eftir at útflutningurin til Russlands tók seg uppaftur hevur tað víst seg at vera sera trupult at útflyta feska vøru til Russlands, orsaka av at tað er eitt krav frá russum at vøran skal verða seglað í bingju í Føroyum. Uppskot til loysn er gjørt um at fáa loyvi frá russum at umlasta feska vøru í Danmark og at fáa danskar heilsufrøðiligar myndugleikar at blombera bingjurnar har. Hetta er tó ikki komið í gongd enn, og eisini skal leggjast afturat, at talan er um eina loysn, ið er umstendilig og viðførir eykakostnað fyri vinnuna, og tí er ikki talan um eina góða loysn fyri vinnuna.

Ein slíkur stongsil, sum føroyingar hava upplivað frá russiska marknaðinum hevur stóra ávirkan á vinnuna, og alt eigur at gerast fyri ikki at koma í slíka støðu aftur. Felagið eftirlýsir ein virknari leiklut frá føroyskum myndugleikum, tá tað snýr um at tryggja marknaðaratgongd fyri føroyska vinnu.

## 3.7 Gransking av týdningi fyri alivinnuna

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum fegnast um, at alt fleiri granskingarverkætlanir koma í gongd, sum hava beinleiðis týdning fyri alivinnuna. Fiskaaling hevur fleiri verkætlanir á skrá, og eisini hevur Havstovan nýligani fingið phd førleika um umhvørvisávirkan av aling. Eisini granskar náttúruvísindadeildin á Setrinum saman við Fiskaaling í streymviðurskiftum á føroysku firðunum.

Á Aliráðstevnuni fyri 2011 vóru úrslit frá verkætlanum hjá Fiskaaling um laksalús og góðska av føroyskum alilaksi løgd fram. Eisini vóru úrslit løgd fram frá granskingarverkætlanum hjá Havsbrún og Havstovuni um ávikavist framleiðsluoptimering av laksi og umhvørvisávirkan av aling.

Tað hevur stóran týdning, at úrslit frá verkætlanum av týdningi fyri alivinnuna verða løgd fram fyri teimum starvsfólkunum, ið arbeiða í vinnuni.

## 3.8 Lúsastøðan

Lúsastøðan hevur verið afturvendandi á skránni fyri nevndarfundir í 2010. Tosað hevur verið um lúsastøðuna, og hvørjar royndir eru gjørdar fyri at basa lúsatrupulleikanum. Eisini hevur Fiskaaling verkætlanir um laksalús. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur á nevndarfundum umrøtt møguleikan fyri at fáa í lag ein felags avlúsingarpolitik.

## 3.9 Salmon from the Faroe Islands

Marknaðarførings verkætlanin "Salmon from the Faroe Islands" varð sett í gongd við ársbyrjan í 2010. Kappingarneytar okkara í Noregi og Skotlandi hava felagsskapir, sum nýta hundraðtals milliónir av krónum um árið til at marknaðarføra alivinnuna við. Í Føroyum hevur lítið verið gjørt við hetta, men nú er gongd komin á. Endamálið við verkætlanini er m.a. at arbeiða við at fáa føroysku alivinnuni ein felags samleika og gera felags marknaðarføringstilfar.

Felags átak í sambandi við sølustevnuna í Boston og Brüssel, ymiskt marknaðarføringstilfar, heimasíðan www.salmon.fo eru millum úrslitini av hesi verkætlan.

Fyribils heldur verkætlanin fram til árslok í 2011.

## 4. Lógir og kunngerðir

Í 2010 eru fleiri lógir og kunngerðir komnar.

### 4.1 Matvørulóg og kunngerð um løggilding

Nýggj lóg um matvørur v.m. er komin (løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010). Endamálið við lógini er m.a. at tryggja, at matvørulóggávan er í samsvari við tey krøv, sum eru sett í avtalum og sáttmálum við m.a. ES. Talan er um eina heimildarlóg og mangla flestu kunngerðirnar enn at gerast.

Við gildiskomu av matvørulógini komu eisini krøv viðvíkjandi spillivatni í gildi. Trupulleikin hesum viðvíkjandi er, at kommunurnar hava til 2015, at fáa spillivatnsøkið skipað. Í november 2010 sendi Havbúnaðarfelagið tí Starvsstovuni skriv um, at tað ikki er samsvar herí millum. Men trupulleikin er eisini, at krøvini í matvørulógini hesum viðvíkjandi ikki eru greitt tilskilaði. Boðini frá Starvsstovuni eru, at tað verður gjørd ein meting í hvørjum einstøkum føri. Hetta heldur felagið elvir til ótryggleika, og tað hevur felagið sent Starvsstovuni fráboðan um.

Nýggj kunngerð um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum (Kunngerð nr. 128 frá 28. desember). Ein broyting við nýggju kunngerðini er at tað ber til at avhenda eina løggilding frá einum eigara til annan til framleiðslu á virkjum og skipum, treytað av, at framleiðslan verður tann sama sum upprunaliga løggildingin var fyri. Broyttu ásetingarnar loyva sostatt, at ein nýggjur eigari kann yvirtaka eina løggilding.

### 4.2 Rakstrarkunngerðin

Nýggj rakstrarkunngerð varð eisini umrødd í seinastu ársfrágreiðing og hevur alivinnan seinasta árið fingið roynt kunngerðina. Kunngerðin fevnir nú um alt alivirksemi og krøvini til rapportering frá alivinnuni eru munandi økt.

Havbúnaðarfelagið hevur fingið fráboðan frá Starvsstovuni, at ætlanin er at endurskoða rakstrarkunngerðina í heyst. Nevndin hevur tí avgjørt, at rakstrarkunngerðin er á skrá til hvønn nevndarfund framyvir har ein holl gjøgnumgongd og kjak um ymsu ásetingarnar skal gjøgnumførast.

### 4.3 Kunngerð um yvirvøku og tálming av lús

Í 2009 kom ein kunngerð um yvirvøku og tálming av lús. Havbúnaðarfelagið tekur undir við, at hetta øki nú eisini er regulerað. Havbúnaðarfelagið heldur tó, at tað er umráðandi, at dagføring av kunngerðini verður gjørd, tá hon er roynd eitt ár ella so.

Fyrst í 2010 kom vegleiðing til kunngerðina um yvirvøku og tálming av lús til hoyringar og gjørdi Havbúnaðarfelagið viðmerkingar til vegleiðingina.

Havbúnaðarfelagið hevur víst á, at tørvur er á at útseta freistina sbrt. § 5, stk. 7 og 8 útsetta til 1. mai 2012, har sett verður fram krav um baðiviðgerð í afturlatnum eindum. Felagið hevur eisini fingið fráboðan um, at ætlanin er at endurskoða kunngerðina í síni heild í heyst.

## 4.4 Bunkringskunngerðin

Nýggj kunngerð um bunkring, flutning av olju o.a. er komin (Kunngerð nr. 84 frá 2. juli 2010).Endamálið við kunngerðini er at fyribyrgja oljudálking í sambandi við bunkring, flutning av olju o.a. Í § 15, stk. 2 er ásett, at flótandi alianlegg eisini eru fevnd av áseting um sjálvtøkur o.tíl.

## 4.5 Kunngerð um taðing

Nýggj kunngerð um taðing hevur verið til hoyringar hjá felagnum, men er henda kunngerð tó ikki sett í gildi enn. Felagið hevur leingi sóknast eftir eini tílíkari kunngerð, og væntar tí at henda verður sett í gildi sum skjótast.
Alivinnan merkir avleiðingarnar av, at taðað verður, serliga tá hetta fer fram uttanfyri ta tíð, tá jørðin klárar at taka ímóti taðingarevnunum. Hetta hevur týdning í sambandi við eftir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni av sjógvgóðsku í framtíðini. Í hesum høpinum skulu virkini skjalprógva, at sjógvur, har laksaringar verða hildnir at landi, í sambandi við tøku, hevur nøktandi mikrobiologiska og kemiska góðsku. Í sambandi við hetta er tað m.a. útlát frá spillivatni, sum er viðkomandi, men eisini taðing kann verða ein trupulleiki í hesum høpinum.

Grundarlagið undir virkseminum á smoltstøðunum er fekst og reint vatn. Í hesum sambandi er taðing eisini ein stór avbjóðing, tí tá tøð rennur í áirnar í sambandi við taðing, ávirkar hetta vatngóðskuna munandi.